# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Gullbrúdleyp í Porkeri



Leygardagin 4. februar verða tað hálvt hundrað ár síðani, at Sunneva og Ejler Sørensen í Porkeri giftust. Suðuroyingar og tey, sum mongu tey seinastu árini hava ferðast í Suðuroy eiga at komast við gullbrúðarparið, tí bæði hava tey koyrt buss og hýruvogn.

Bæði eru tey ættað úr Porkeri, og tað er merkisvert, at foreldrini hjá teimum báðum eisini vóru porkeningar.

Sunneva er fødd 16. juli í 1934. Mamman var Daniella fødd Bech og úr Skálanum, og pápin var Mikkjal Magnussen av Klovanum. Sunneva er einabarn.

Ejler er føddur 1. november 1928. Mamma hansara var Sunneva fødd Djurhuus og ættað úr Skemmuni, og pápin var Petur Sørensen undir Stígnum. Sunneva og Petur fingu fimm børn. Elsebeth Susanna ella Diddan fødd í 1920 giftist við Esmari Olsen av Toftum og búsettist í Porkeri. Daniel Johannes føddur í 1922 giftist Johannu Johannesen av Skála, har tey búsettust. Otto føddur í 1925 giftist Nelly Nielsen úr Nólsoy. Tey búgva í Havnini. So var tað Ejler, og yngstur er Ewald føddur í 1931 og giftur Esther fødd Jacobsen og ættað úr Vági. Tey búgva í Havnini.

Diddan doyði í 1999, og Jóhannes doyði í 2003.

Sunneva og Ejler giftust inn á Klovanum, og har hava tey búð hesi hálvt hundrað árini, sum tey hava livað í hjúnarlagi.

Sum so mangar aðrar tá í tíðini so fór Sunneva í húspláss, tá ið hon gott og væl var liðug við skúlan. Hon tænti bæði í Porkeri og í Vági. Tá ið børnini vóru smá, var Sunneva heimagangandi. Í 1965 tók hon koyrikort, og so fór hon at koyra taxa. Seinni var hon heimahjálp, og í mong ár vaskaði hon skúlan í Porkeri. Í mong ár hevur Sunneva um vetrarnar gingið til postalínsmáling í kvøldskúlanum í Porkeri, og hon er ófør til hondarbeiði.

Lívsstarvið hjá Ejleri var at vera bilførari. Hann tók koyrikort í 1948. Tá fekk hann sær lastbil, sum hann hevði inntil í 1963. Eitt nú koyrdi hann fyri fleiri reiðarí í Vági, hann plagdi at vera við í lossingini, tá ið Tjaldrið var í Vági, og so koyrdi hann tað, sum bygdarfólkið hevði brúk fyri - eitt nú hoyggj, seyð, tøð, torv og kol, sum hann var í Rangabotni eftir.

Í 1963 keypti Ejler buss, og seinni fekk hann sær taxabil. Hann koyrdi eitt nú skúlabørnini millum Porkeri og Vág. Miðskeiðis í áttati árunum fór hann saman við Osbjørn Mortensen at koyra bygdaleiðir. Teir stovnaðu felagið pf. Suðurleiðin, og teir áttu fyrsta stóra bussin, sum kom til Suðuroyar. Osbjørn doyði brádliga í 1988, og Ejler helt fram at koyra, inntil hann í 1998 var 70 ára gamalur. Tey síðstu árini hjálpti yngri sonurin honum.

Í bæði ættini hjá Sunnevu og Ejler var væl av jørð í húsinum, og tey hava bæði verið við í tí arbeiðnum. Nú Ejler er vorðin pensionistur, hjálpir hann við at passa veðrarnar hjá næsta ættarliðnum.

Ejler hevur verið íðin VB viðhaldsmaður, og inntil fyri ikki so mongum árum síðani sá hann flestu dystirnar í fremstu deildini, um tað so var í Vági ella á Tvøroyri. Tá ið vágbingar í 1998 vóru í Brno í Kekkia og spældu Intertoto, var hann í ferðalagnum.

Sunneva og Ejler eiga fýra børn, sum øll búgva í Porkeri. Mikkjal føddur í 1956 er giftur Jastrid á Dul úr Havnini. Børnini hjá teimum eru Eiler, Jákup, Dania, Hanna og Tórur.

Petur nevndur Piddi føddur í 1960 er giftur Annu Sofíu Dragaberg úr Klaksvík. Børnini hjá teimum eru Sunnvá, Helena og Eirikur.

Børnini hjá Dóris, sum er fødd í 1965, eru Páll, Tóki og Eiler. Siri, sum er fødd í 1970, er gift Hermani Olsen úr Hvalba. Børnini hjá teimum eru Signar, Birita og Svanna.

Stóra dagin vera Sunneva og Ejler Sørensen at hitta heima við hús frá klokkan 13 til 18.

**M**

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Elsu Purkhús,** Klaksvík, fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi, fríggjadagin kl. 18 heim í Betesta. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13.

Tey, ið vilja minnast Elsu, kunnu lata eina gávu til Akurin, konta í peningastovnunum.

Kistan við **Gunleig Poulsen**, Klaksvík, fer úr kapellinum, leygardagin 4. februar kl. 18 heim í Christianskirkjuna. Jarðarferðin verður sunnudagin 5. februar kl. 13.

Tey, ið vilja minnast Gunleig, kunnu lata eina peninga gávu til Emmaus konta í Norðoyar Sparikassa.

**Jon Edvard Hansen**, Miðvágur, andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 2. februar, 74 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Miðvágs kirkju sunnudagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Jon Edvard kunnu lata Føroya felag móti Krabbameini eina peningagávu.

**Jalgrím Herdal**, fyrrverandi postmeistari, ættaður úr Vági, andaðist á Sjúkrahúsinum í Hillerød 1. februar, 69 ára gamal.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum mongu, ið vístu okkum samkenslu, tá ið okkara kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**Hjartvar Kjærbæk**

andaðist og fór til gravar.

Tøkk øll tit, sum á ymiskan hátt hjálptu til.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og gávur.
Og tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Herborg, Ólavur, Maria, Hjartvar og Páll Magnar**

## Glarsmiðjan í nýggjum hølum




*Fríggjadagin læt Glarsmiðjan upp í nýggjum hølum í Dr. Jacobsensgøtu*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Fríggjadagin 3. februar læt Glarsmiðjan - innramming og gallarí upp í nýggjum hølum í Dr. Jacobsensgøtu 7 í Havn. Í hesum sambandi var móttøka fyri listafólkum, viðskiftafólkum og øðrum.

Glarsmiðjan byrjaði í N. Finsensgøtu fyri umleið 20 árum og flutti fyrst í 90-unum til Bøgøtu 16.

Í 1998 keypti Anders Jonassen fyritøkuna. Sama árið keypti hann eisini húsini í Dr. Jacobsensgøtu 7, sum nú eru umbygd til virksemið hjá fyritøkuni. Umframt gallarí, handil og verkstað í miðhæddini er virksemið víðkað til eisini eitt gallarí í kjallaranum.

Anders Jonassen sigur, at endamálið hjá honum er, at hava tað sum danir kalla ein "kunsthandil", har fólk kunnu koma inn og keypa ein málning á staðnum og ikki noyðast at bíða til ein evt. framsýning er liðug. Men høvuðsvirksemið hjá fyritøkuni er farmvegis innramming. Glarsmiðjan selur eisini steinprent fyri Grafiska verkstaðin.

Magnus Hansen, arkitektur, hevur teknað, og Sp/f Húsavarðartænastan hevur staðið fyri byggingini.

## Poul og Ludvík í Smiðjuni



*Poul Hentze og Ludvík Petersen hava í hesum døgum eina felags framsýning í Smiðjuni í Lítluvík-*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Hósdagin 2. februar læt ein málningaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík. Tað eru teir báðir Poul Hentze og Ludvík Petersen í Havn, sum sýna fram umleið 50 málningar.

Talan er um bæði oljuvatnlits- og pastellmálningar. Myndevnini er øll úr føroysku náttúruni.

Poul og Ludvík hava áður sýnt fram sínar málningar, men hetta er fyrstu ferð at teir hava eina felags framsýning.

Poul er útbúgvin lærari og undirvísir m.a. í handverki og list í Hoyvíkar skúla. Ludvík er útbúgvin bakari og málar í síni frítíð.

Framsýningin er opin til og við 8. februar. Opið er allar dagar frá kl. 16-19.